## Upptøkuroynd

**Tónleikaverk**

a) Næmingur framførir tvey ymisk verk. Samlað longd: 5-6 min. Verkini skulu vera av ymiskum stílslagi og lyndi

**Prima vista – secunda vista**

b) Blaðspæl svarandi til 4. stig Associated Board

**Tónastigar o.a.**

c) svarandi til 5. stig Associated Board

Viðm. Umframt hetta, verður umsøkjari hoyrdur í hoyrulæru sambært mannagongdum musikkskúlans.
Stutt samrøða við próvdómarar verður eftir royndina. Royndin varir eini 20 min íalt

## 1. árið

### Tónleikaverk

a) 5 ymisk tónaleikaverk: ein lítil konsertskrá umleið 18 min.
Viðm. *Tað eina verkið skal vera ein etuda*

Dømi:
1. Danza del Altiplano (Brouwer),
2. Allemande-Sarabande-Bourree, úr BWV 996 (J.S.Bach),
3. Sats úr 5 Intermezzi (Holmboe),
4. verk eftir Tarrega (t.d. Capricho Arabe),
5. verk úr Suitum eftir S.L. Weiss (t.d. Passacaglia í D-dur)
*ella verk áleið hesi áðurnevndu.*

### Etudur

a) 4 etudur

Dømi:
1. Fernando Sor, opus 60, 29 ella 35,
2. Etudir hjá Giuliani, úr Villa-Lobos I-VI,
3. eftir Brouwer (Estudio Sencillos 1. og. 2. hefti)
4. eftir Pujol (t.d.Nocturne ella El Abejorro),
5. eftir Tarrega (t.d. Estudio en forma di Menuetto ella Estudio en la),
6. úr Carcassi opus 25, etudir eftir Sagreras.

### Tekniskar venjingar

Dømi: a) Venjingar úr verkum/skúlum hjá Tarrega, Tennant (Pumping Nylon), Pujol, Carlevaro, Luise Walker, Segovia, R. Iznaola, T. Norman, N. Paganini, J. Duarte, A. Shearer, M. Lopez Ramos og annað

### Tónastigar o.a.

a) Tónastigar á leið krøvunum í Associated Board 6. stig

b) Tríklangir á leið krøvunum í Associated Board 6. stig

### Prima vista – secunda vista

a) Blaðspæl á leið krøvunum í Associated Board 6. stig

## 1. ársroynd

### Tónleikaverk

a) Næmingurin spælir tvey/trý ymisk verk. Samlað longd 8-10 min. Verkini skulu vera av ymiskum stílslagi og lyndi. Eitt av verkunum skal vera ein etuda. Royndin tekur einar 20 min. íalt

## 2. árið

### Tónleikaverk

1. 6 ymisk tónleikaverk: ein lítil konsertskrá umleið 24 min.

Viðm: *Eitt av verkunum skal vera ein etuda*

Dømi:
1. Haendelvariatiónir (Giuliani),
2. Prelude-Sarabande-Gigue BWV 997 (J.S.Bach),
3. Fantasy (Dowland), Asturias/Leyenda (Albeniz),
4. Danza Caracteristica (Brouwer) *ella verk áleið hesi áðurnevndu.*

### Etudur

a) 6 etudur

Dømi: Fernando Sor, opus 60 ella 29, etudir eftir Coste, úr Villa-Lobos I-VI, Sagreras (t.d. El Colibri), úr Carcassi opus 25, eftir Pujol (t.d. Bolero), Etudir eftir Giuliani, (t.d.opus 1), eftir Tarrega (t.d. Estudio velocidad)

### Tekniskar venjingar

Dømi: Venjingar úr verkum/skúlum hjá Tarrega, Tennant (Pumping Nylon), Pujol, Carlevaro, Luise Walker, Segovia, R. Iznaola, T. Norman, N. Paganini, J. Duarte, A. Shearer, M. Lopez Ramos og annað

### Tónastigar o.a.

a) Tónastigar áleið krøvunum til Associated Board 7 stig.

b) Tríklangir áleið krøvunum til Associated Board 7 stig.

### Primavista – secunda vista

a) Blaðspæl áleið krøvunum til Associated Board 7 stig.

## 2. ársroynd

### Tónleikaverk

b) Næmingurin spælir trý/fýra ymisk verk. Samlað longd 12-14 min. Verkini skulu vera av ymiskum stílslagi og lyndi. Eitt av verkunum skal vera ein etuda. Royndin tekur einar 25 min. íalt

## 3. árið

### Tónleikaverk

a) 8 ymisk tónleikaverk: ein lítil konsertskrá umleið 35 min.

Viðm: *Eitt av verkunum skal vera ein etuda*

Dømi:

1. En los trigales (Rodrigo),
2. Sonata opus 15, 1. satsur (Giuliani),
3. úrvaldir satsir úr Gittarkonsert (m.a. Fantansia pour un Gentilhombre),
4. Mozartvaritiónir, opus 9 (Sor),
5. Tango en Skai (R. Dyens),
6. Sonata (D. Scarlatti),

*ella verk áleið hesi áðurnevndu.*

### Etudur

a) 8 etudur

Dømi: Etudir eftir Fernando Sor, úr Villa-Lobos I-VI og VII-XII, Sagreras (t.d. El Colibri), úr Carcassi opus 25, Etudir eftir Giuliani, Estudio de Concierto (A.Barrios), Recuerdos de Alhambra, Estudio d'Alard (Tarrega)

### Tekniskar venjingar

Dømi: Venjingar úr verkum/skúlum hjá Sor, Giuliani, Tarrega, Tennant (Pumping Nylon), Pujol, Carlevaro, Luise Walker, Segovia, R. Iznaola, T. Norman, N. Paganini, J. Duarte, A. Shearer, M. Lopez Ramos og annað

### Tónastigar o.a.

a) Tónastigar áleið krøvunum til Associated Board 8. stig

b) Tríklangir áleið krøvunum til Associated Board 8. stig

### Prima vista – secunda vista

a) Blaðspæl áleið krøvunum til Associated Board 8. stig

## 3. ársroynd/próvtøka

### Tónleikaverk

a) Næmingurin framførir eina blandaða konsertskrá. Samlað longd 16-20 min. Verkini skulu vera av ymiskum stílslagi og lyndi. Eitt av verkunum skal vera ein etuda. Royndin tekur einar 30 min. íalt

**Viðmerkingar:**

Í fyrstani verður undirvíst í gittar 2 ferðir um vikuna á 45 min. Umframt hjálærugreinir, samanspæl, kamartónleik og annað, ið ásett er av skúlanum.
Næmingurin skal eggjast at framføra alment og miðað verður ímóti, at næmingurin fær eitt repertoire.
Eisini er týdningarmikið, at teknisku venjingarnar (Etudir, skalair, blaðspæl o.l.) verða væl og virðiliga gjøgnumgingnar.
Ein avtala verður gjørd við ársbyrjan um repertoire, bæði í tónleikaverkum og etudum. Hetta er ein avtala millum lærara og næming, ið skal fylgjast.
Men møguleiki skal tó vera at tillaga ætlanina.

**Intern roynd:**

Fyrst í desember og síðst í mars verður intern roynd á Musikkskúlanum, har ið næmingur skal framføra etudir, umframt skalaspæl, blaðspæl og aðrar greinar innan gittarspæl.
Etudurnar skulu vera av listanum, ið er avtalaður frammanundan. Tvær av etudunum velir næmingurin sjálvur at framføra, meðan viðkomandi lærari velir eina etudu.
Næmingurin fær eisini stutt verk sendandi/handað tveir dagar undan royndina og skal hetta verkið framførast á hesi roynd.

Lærarin og eitt umboð fyri skúlan meta um avrikið. Munnligt úttalilsi verður givið eftir royndina.

**Mannagongd:**

3 etudir (av listanum, ið svarar til árgangin)
Tónleikaverk, (umleið 1-2 min) ið næmingurin hevur fingið sendandi 2 (tveir) dagar frammanundan.
Blaðspæl (primavista/sightreading)
Skalaspæl og tríklangir

**Vanliga støðuroyndin:**

Árliga støðuroyndin verður sambært reglum skúlans.